
Kygg og Koyr

Sjónvarp Føroya



Finn Storgaard spælir Gustav Friis

Fríggjadagin kl. 22.00:

Matador

Heitið av seinasta parti í Matador er »New Look«.

Alt sær nýtt og øðrvísi út. Mads fer til USA. Maud og Hans Christian halda silvurbrúdleyp. Og Agnes, sum altíð hevur droymt um at bliva til nakað, verður tað eisini, og Røde noyðist at taka hana sum hon er.

Aftan á at hava fylgt við familjunum í Korsbæk í 18 ár og 24 pørtum, siga vit farvæl við Matador.

Leygardagin kl. 23.50:

Løgreglumenn

Greenberg og Hantz eita teir í filminum og eisini í veruleikanum. Men hesir báðir løgreglumenninir vórðu eisini kendir sum »Batman og Robin«. So einsamallur var bardagi teirra móti brotsmonnunum í teirra øki.

Teir vilja gerast kriminalløgreglumenn, teir vilja fanga teir stóru narkohávarnar. Og tá ræður um at brúka óvanligar framferðarhættir. Greenberg og Hantz lata seg í onnur klæði og fara til verka.

Men løgregluovastin dámar ikki framferðarháttin hjá teimum báðum.

»The Super Cops« er ein kriminalfilmur, sum tekur trupulleikarnar sum teir koma. Hetta eru »livandi« útgávur av Batman og Robin, vit siggja.

Ron Leibman spælir Greenberg og David Selby spælir Hantz.

Gordon Parks hevur leikstjórnað eftir leikriti hjá Lorenzo Semple.

Sunnudagin kl. 21.55:

Svensk hjørtu

Hetta er triði partur í sendirøðini »Svensk hjørtu«.

Elisabeth arbeiðir sum heimahjálp og vil gerast leys aftur. Men hon kennir eina ábyrgd fyri Torsten. Tá ið hon hittir Henrik aftur, veit hon ikki hvat hon skal gera. Henrik er skildur frá Kristinu, men kennir eisini ábyrgd fyri henni og dætrunum.

Helle og Børje hava eisini sítt at stríðast við — sonurin, sum er brekaður, skal hann koma heim, ella skal hann á eitt heim fyri brekað børn?

Sunnudagin kl. 22.55:

Tann síðsta tíðin

Í 1983 doyði Toben Christensen, sum var professari í kirkjusøgu við universitetið í Keypmannahavn. Einkjan, Else Marie Bukdahl, sum er rektari á Det kg. danske Kunstakademi, sigur frá seinastu fimm vikunum í livi hansara.

Fimm vikur var tíðin, tey fingu at fyrireika seg í. Meðan tey vóru við Vesturhavið og ferðaðust, fingu tey at vita, at krabbameinssjúka hansara var ólekjandi, og hann fór skjótt at doyggja. Fimm vikur seinni doyði hann.

Tað týdningarmesta hesa tíðina var álitið á barnatrúnna, at vit eru Guds børn, líkamikið hvat hendir. Ta seinastu náttarvaktina fer ein, sum er sterkari enn vit, at koma og taka sær av okkum.

Men so var alt tað praktiska, hvussu kann lívið halda fram, tá ið tú veitst, at hetta eru tínir seinastu dagar? Torben Christensen vildi hava bøkur sínar liðugt skrivaðar, og hann vildi tosa við onnur fólk. Hann vildi sjálvur siga verðini farvæl og samstundis fylgja við í tí, sum hendi innan arbeiði hansara.

Elsa Marie bað sjálv fólk koma at vitja, skrivaðu brøv og ringdi. Felagsskapurin riggaði væl til tað seinasta. Eisini í kirkjugarðinum. Tað uggaði hana, at tey somu, sum høvdu vitjað mann hennara tær seinastu vikurnar, eisini vóru og fylgdu honum.


Men tað var svárt — missurin — deyðin er dapur.

Elsa Marie hevur samrøðu við Jørgen Thorgaard.


Brumi

Vesturtýskar sláimaskinur

— alt frá plenuklipparum til størri jarðarbrúksmaskinur!



Model: RM 42, 44 og 48
Motorur: bensin — 4 takt
Sláibreidd: 40 — 47 cm
Grasposi: 45 — 65 ltr.



Model: E 32 og E 42
Motorur: 900 og 1300 watt
Sláibreidd: 30 og 40 cm
Grasposi: 30 og 45 ltr.

Støkkið inn á gólvið ella ringið og fáið tilfar og prisir sendandi.

Model 70, 71, 80, 90 og 100
Motorur: Honda -4 takt bensin
Gear: fram + bak
Sláibreidd: 70, 80, 90 og 100 cm

Kaj Andreasen Pf.
Akranesgøta 5 - Postbox 1095 - 110 Tórshavn - Tlf. 156 00



HM-TILBOÐ

Every game — every goal — every minute — we won't miss a kick . . .

Tveir teir fyrstu mánaðirnar fyri ½ prís

Verandi leigukundar, sum viðmæla ein nýggjan kunda, fáa — eins og nýggi kundin — ½ leigugjald í tveir mánaðir.

DER VIDEO HI-FI-TV
Niels Finsensgøta 12 · Tlf. 151 32
hevur sjónvørp til leigu